Dong í Tinganesi - trúgva framvegis uppá Føroyar

Jan Müller

13.10.2013 - 13:49

Oljan.fo

“Vit hava kunnað landsstýrismannin í oljumálum, Johan Dahl, um okkara ætlanir í Føroyum og hava samtíðis takkað honum fyri tey bæði loyvini vit hava fingið á føroyska landgrunninum,” sigur Søren Gath Hansen, ovasti stjóri fyri altjóða leiting hjá danska orkufelagnum DONG.

Hann vitjaði í Tinganesi í farnu viku saman við tveimum av næstu medarbeiðarum sínum, Søren B. Andersen, stjóra fyri leiting í bretskum og føroyskum øki og Jan Terja Edvardsen, sum stendur á odda fyri jarðfrøðiliga partinum av leitingini hjá DONG.

DONG søkti fyrr í ár um tvey leitiloyvi í Føroyum umvegis nýggju “Open Door” skipanina, har myndugleikarnir kunnu lata loyvi uttan at skula fara í løgtingið við teimum. Hetta er sum so fyrsta royndin at troyta nýggju skipanina og skilst, at báðir partar, bæði almennir føroyskir myndugleikar og oljufelagið eru væl nøgdir við hesa nýggju skipanina, tí hon ger

tað lættari og skjótari hjá oljufeløgunum at fáa loyvi at leita.

Søren Gath Hansen er sum so heldur eingin fremmandur gestur í Føroyum. Hann var eitt av teimum fyrstu útlendsku oljufólkunum, sum kom til Føroya miðskeiðis í 90-unum fyri at vera við í fyrireikingunum til oljuleiting her. Sjálvur er hann fegin um at vera aftur í Føroyum og sigur seg vera væl nøgdan við, at tað framvegis eru fleiri oljufeløg, sum vísa landgrunninum ans og sum vilja bora brunnar.

“Hóast vit hava vónir um at finna olju og gass við Føroyar, so kann eg bert endurtaka tað eg segði fyri skjótt 15 árum síðani, nevniliga, at tað verður ein long og tung gongd at rudda slóð fyri olju- og gassfundum. Tað tekur tíð, men mest umráðandi er at halda lív í leitingini, hvat vit framvegis vilja vera partur av, og tíbetur eru tað eisini fleiri onnur feløg, sum hava somu vónir sum vit.”

Søren Gath Hansen heldur fundurin við Johan Dahl var sera jaligur og opin. “Eg haldi landsstýrismaðurin var sera fegin um, at DONG aftur er farið at vísa “Gullhorninum” og Marjunfundinum áhuga, tí vit vóru jú við til at finna hesa kelduna í 2001. At vit nú aftur eru fúsir at hyggja at Marjun og øðrum leitimiðjum haldi eg ráðharrin heldur hevur alstóran týdning fyri føroyska oljuleiting.”

DONG er í løtuni í ferð við at kanna og tulka seismikk, sum fyrr er skotin í økinum. Hann fevnir so um eitt størri øki, har DONG hevur útpeikað fleiri ymisk leitimið, har Marjun er eitt teirra. Hini leitimiðini (prospektini) eru eisini navngivin og hava tey fingið nøvn á fólkum, sum komu til Føroyar á fyrstan sinni og sum eisini fóru víðari til Íslands og Amerika. Hesi eru m.a.: Naddoddur, Grani, Angantyr, Kamban, Gerda, Gøtuskeggi og Marjun.

Sum skilst fer DONG nú at brúka orku uppá at granska seismikk og gera ymsar kanningar, áðrenn avgerð verður tikin um at fara víðari og møguliga bora brunn í økinum einaferð í framtíðini. At felagið vitjar í Tinganesi við so týðandi og mannsterkari sendinevnd kann bert vera eitt tekin um, at danska orkufyritøkan veruliga meinar nakað við tað at vera partur av leitingini við Føroyar og nú entá sum fyristøðufelag. Við Dong sum fyritøðufelag eisini hevur føroysk oljuleiting fingið uppaftur meira viðrák. Hitt fyristøðufelagið á landgrunninum er Statoil. Vert er eisini at bíta merki í, at Statoil og DONG komandi ár fara at bora ein brunn saman.

(Lesið eisini samrøðu við Johan Dahl, oljumálaráðharra í komandi grein.)

Mynd

DONG Energy vitjar í Tinganesi. Fv. Jógvan Elias W. Poulsen, umboðsmaður hjá DONG í Føroyum, Jan Terje Edvardsen, oddamaður fyri jarðfrøðiligu deildina hjá DONG., Søren Gath Hansen, stjóri fyri altjóða leiting, Johan Dahl, landsstýrismaður og Søren B. Andersen, leiðari fyri leitingini í Bretlandi og Føroyum

Dong vitjar hjá FOÍB á Bryggjubakka.

Myndatøka Jan Müller/oljan.fo